## UTTAN ÚR HEIMI

## Banna tubbaksreklamu

Ráðharraráðið hjá ES hevur samtykt at banna allari tubbaksreklamu í útvarpi, bløðum og á alnótini. Frammanundan er tað bannað at hava tubbaksreklamur í sjónvarpinum í ES-londunum.

Heilsumálaráðharrarnir í ES-londunum viðgjørdu málið mánadagin, og aftan á fundin segði danski heilsumálaráðharrin, Lars Løkke Rasmussen, at greiður meiriluti er fyri at reklamubanninum. Hann fegnaðist serliga um, at nú verða somu reglur galdandi í øllum londunum, tí frammanundan høvdu summi lond longu bannað tubbaksreklamu í útvarpi, bløðum og á alnótini.

Men limalondini hava góða tíð til at seta bannið í verk, og tí hvørvur tann seinasta tubbaksreklaman ikki fyrr enn í 2005.

## Skiparin fekk sekkin

Skiparin á amerikanska kavbátinum USS "Oklahoma City" hevur fingið sekkin, eftir at kavbátur hansara stoytti saman við norska tangaskipið "Norman Lady" tann 13. november.

Hvørki kavbáturin ella farmaskipið fingu stórvegis skaða, tá tey stoyttu saman í Gibraltar-sundinum, men amerikanska flotaleiðslan metir tilburðin at vera sera álvarssaman. Ivaleyst hugsa amerikanarar um tilburðin, tá kavbáturin USS "Greenville" stoytti saman við eitt japanskt fiskiskip í Kyrrahavinum í februar í fjør. Níggju japanskir fiskimenn doyðu í samanstoytinum, sum elvdi til stóra øsing í Japan.

Skiparin á USS "Greenville" varð eisini koyrdur í land eftir tilburðin.

## Doyðu í kulda

Tveir ungir dreingir úr afrikanska landinum Ghana vórðu mánadagin funnir deyðir í einum hjólrúmi undir einum ghanesiskum ferðamannaflogfari, sum var komið úr Ghana til London. Tað var ein flogmekanikari, sum dann dreingirnar.

Myndugleikarnir í Ghana siga, at dreingirnir høvdu fjalt seg í hjólrúminum, tí teir vildu sleppa til Bretlands, men hvussu tað eydnaðist teimum at sleppa inn í rúmið, uttan at nakar á flogvøllinum varnaðist tað, er ein gáta, sum myndugleikarnir nú royna at loysa.

At teir báðir dreingirnir doyðu, áðrenn flogfarið kom vegin fram, undar ongan. Flogferðin úr Ghana til London tekur seks tímar. Flogførini flúgva umleið 30.000 føtur uppi, og har frystir umleið 60 stig í hjólrúmunum undir flogførunum.

## Blaðstjóri í politikk

Blaðstjórin á danska blaðnum Berlingske Tidende, Karsten Madsen, hevur gjørt av at fara úr starvinum, tí hann ætlar at royna seg í politikki.

Karsten Madsen sigur, at hann hevur leingi umhugsað at fara upp í politikk, og nú hevur hann so gjørt av at royna at sleppa í ES-tingið. Hann er limur í flokkinum Vinstra, men noyðist sjálvandi fyrst at tryggja sær nóg stóra undirtøku til at verða uppstillaður.

Tann 48 ára gamli Karsten Madsen hevur verið blaðstjóri og aðalstjóri á Berlingske Tidende síðani 1. oktober í fjør. Frammanundan var hann blaðstjóri á Jydske Vestkysten.

# 66 skip sett á svartalista

**66 farmaskip fáa nú forboð fyri at sigla í ES-sjógvi, tí tey lúka ikki trygdarreglurnar.**

SKIPAFERÐSLA
*Árni Joensen*

Oljuvanlukkan í Spania hevur rættiliga loypt hvøkk á myndugleikarnar í fleiri ES-londum, og í gjár varð fráboðað, at ES-nevndin hevur givið 66 skipum forboð fyri at sigla ígjøgnum ES-sjógv. Roknað verður við, at einkultskinnað oljutangaskip fáa eisini forboð fyri at koma í ES-sjógv í framtíðini.

26 av teimum bannlýstu skipunum sigla undir turkiskum flaggi, 12 sigla undir hentleikaflaggi hjá St. Vincent í Karibiska Havinum, og níggju skip hava kambodiska flaggið í mastrini.

ES-nevndin sigur, at ætlanin við avgerðini er at noyða lond at fylgja galdandi altjóða reglum um skipaferðslu og trygd á sjónum, og ES-formaðurin, Anders Fogh Rasmussen, hevur sagt, at skipaferðslan er eitt so álvarssamt mál, at hon verður tikin upp til viðgerðar á toppfundinum í Keypmannahavn miðskeiðis í mánaðinum.

At ES ber so skjótt at nú kemst uttan iva av, at spanski forsætisráðharrin, Jose Maria Aznar, er undir stórum politiskum trýsti í heimlandinum aftan á vanlukkuna við "Prestige".

# Bush er ikki nøgdur

**Samstundis sum vápnaeftirlitsmenninir hjá ST kannaðu eina av borgunum hjá Saddam Hussein, segði George W. Bush, at hann er ikki nøgdur við tað, sum irakski forsetin higartil hevur víst**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen*



*– Leggur Irak ikki øll kort á borðið innan 6. desember, verður kríggj, sigur George W. Bush*
*Mynd: Reuters*

- Tey tekin, sum vit higartil hava fingið úr Irak, eru ikki nøktandi.

Hetta var fyrsta viðmerkingin hjá amerikanska forsetanum, síðani vápnaeftirlitsmenninir hjá ST fóru til arbeiðis í Irak í síðstu viku. Bush kom við sínum viðmerkingum í einari røðu í verjumálaráðnum Pentagon.

Hann tók uppaftur, at irakski forsetin, Saddam Hussein, skal leggja øll kort á borðið innan tann 6. desember, vil hann sleppa undan kríggi.

- Í sambandi við kanningarnar fer USA at vita, um Saddam Hussein hevur broytt sín framferðarhátt seinastu ellivu árini. Hevur hann gjørt av at samstarva treytaleyst ella ikki? Tað, sum vit higartil hava sæð, bendir ikki á nakað á tað borðið, segði Bush.

Bush var í Pentagon í sambandi við, at hann júst hevði staðfest eina lóg, sum gevur hermegini 355 milliardir dollarar at ráða yvir.

# Vilja hava sama skatt í ES-londunum

**ES-stórveldini Frakland og Týskland skjóta nú upp, at øll londini í samveldinum skulu hava somu skattaskipan, men uppskotið møtir mótstøðu**

SKATTAPOLITIKKUR
*Árni Joensen*

Uppskotið hjá Fraklandi og Týsklandi er liður í royndunum hjá teimum báðum londunum at samskipa fíggjarpolitikkin í øllum ES-londunum. Hesar royndirnar hava møtt harðari mótstøðu í øðrum limalondum, og soleiðis verður eisini við uppskotinum um felags skattaskipan.

Bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, er millum teirra, sum eru ímóti týsk-franska uppskotinum, tí eftir hansara tykki eiga londini at umsita sín skattapolitikk hvør sær. Bretska stjórnin vil heldur hava eina kapping um tann rætta skattapolitikkin heldur enn at laga seg eftir skattinum í Týsklandi og Fraklandi, sum er væl hægri enn í Bretlandi.

Týskland og Frakland hava boðað frá, at tey fara at leggja skattauppskotið fyri nevndina, sum situr og arbeiðir við einum uppskoti um at endurskoða allan ES-bygnaðin. Hetta er í grundini ikki í samsvari við ta upprunaligu ætlanina um at broyta bygnaðin, tí hon umfatar ikki skattapolitikkin.

Skattauppskotið verður uttan iva á borðinum, tá franski forsetin, Jacques Chirac, kemur til Berlin í dag at tosa við Gerhard Schrøder, kanslara. Hildið verður, at teir báðir fara at gera enn eina roynd at gera greitt, at Týskland og Frakland meta seg vera oddalondini í ES.

Eitt endamál við felags fransk-týska uppskotinum er at samskipa skattareglurnar í limalondunum, so skatturin hjá vinnufyritøkum verður tann sami í øllum londunum. Hetta skal gerast fyri at sleppa undan, at fyritøkur flyta til lond, sum hava lægri vinnuskatt. Írland, sum hevur lægsta skattin í ES, hevur mangan staðið fyri skotum, tí fyritøkur gera sær dælt at lága skattinum har.



# Verkfallið útsett í 14 dagar

**Samráðingarnar ímillum Skipara- og Navigatørfelagið um yvirmenninar við fiskiskipunum eru slitnaðar**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*

Enn er onki komið burturúr samráðingunum ímillum Skipara- og Navigatørfelagið og Reiðarafelagið um nýggjan sáttmála fyri yvirmenninar við teimum føroysku fiskiskipunum.

Tvørturímóti er so langt ímillum partarnar, at samráðingarnar eru slitnaðar, so at tað var neyðugt at fáa semingsmannin upp í.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur sagt sáttmálan við Føroya Reiðarafelag upp at fara úr gildi 1. desembur 2002.

Sáttmálin umfatar skiparar og stýrimenn við øllum fiskiskpunum.

Sìðani hava tveir fundir verið millum feløgini í samband við sáttmálan.

– Á fyrra fundinum, ið var fyri eini viku síðani, legði Føroya Skipara og navigatørfelag síni krøv fram og meiri hendi ikki á tí fundinum, sigur Ellintur Abrahamsen, formaður í felagnum.

– Á seinna fundinum, sum var í farnu viku, legði Reiðarafelagið síni tilboð og síni krøv fram og Navigatørarnir boðaðu frá, hvat tað bar til a góðtaka og ikki.

### Broytti undirskrivaðan sáttmála

Ellintur Abrahamsen sigur, at Reiðarafelagið hevur boðað frá, at tað vil ikki samráðast, uttan so at Skipara- og Navigatør felagið frásigur sær sáttmálan, sum feløgini skrivaðu undir 12. januar 1999.

– Samstundis skuldu vit váttað, at vit góðtóku at samráðast út frá einum sáttmála, sum Reiðarafelagið hevur broytt aftan á,a t hann varð skrivaður undir.

Ellintur Abrahamsen greiðir frá, at tá ið sáttmálin, sum nú er, varð skrivaður undir, spurdi hann, um tað ikki kundi bera til at rætta sáttmálan, var nakað komið skeivt fyri.



*Ellintur Abrahamsen sigur, at Reiðarafelagið vil bara samráðast út frá einum sáttmála, sum Reiðarafelagið av sínum eintingum broytti, eftir at hann varð skrivaður undir og tað kann ikki koma upp á tal*

– Tað vórðu umfatandi broytingar gjørdir í sáttmálanum og tí hildu vit, at møguleikin at rætta sáttmálan skuldi vera til staðar, vísti tað seg, at okkurt mistak var gjørt.

– Tað vildi semingsstovnurin ikki hoyra talan um.

– Men nakrar dagar seinni komu boð frá semingsstovninum um, at onkrar broytingar vórðu gjørdar, tí mistøk vórðu gjørd í skrivaða tekstinum. Í hesum sambandi tosaði hvørki semingsstovnurin ella Reiðarafelagið við okkum.

– Formaðurin í Reiðarafelagnum sigur, at endin var, at Reiðarafelagið fór at betala eftir tí broytta sáttmálanum.

Tað endaði við sakarmáli, har vit kravdu at semingsstovnin varð dømdur at viðurkenna, at ein sáttmáli, sum varð undirskrivaður, kundi ikki broytast.

– Tað fingu vit viðhald í frá Føroya Rætti. Og vit bóðu tískil Reiðarafelagið boðað limum sínum frá, atr gjaldast skuldi eftir undirskrivaða sáttmálanum.

– Men tað broytti ikki støðuna og krav liggur nú inni um, at Reiðarafelagið skal betala eftir tí, sum er undirskrivað.

Eitt, sum Reiðarafelagið broytti, var eykaparturin hjá 2. stýrimanni við nótaskipum undir 1500 BRT. Fyrr fingu teir 1/4 part eyka, men í sáttmálanum, vit hava skrivað undir, er eykaparturin hækkaður til 1/2 part.

– Um aðrar eykapartar stendur í undirskrivaða sáttmálanum, at teir skulu roknast av søluvirðinum, men Reiðarafelagið vil hava, at tað skal vera av avlopinum, so at útreiðslurnar skulu dragast frá áðrenn, soleiðis sum gjørt hevur verið frammanundan.

– Nú, vit koma aftur til samráðingarn, krevur Reiðarafelagið, at vit skulu samráðast út frá sáttmálanum við tí broyttu orðingini og ikki útfrá sáttmálanum, sum er undirskrivaður.

Ellintur Abrahamssen sigur, at tað kann Skipara- og Navigatørfelagið ikki góðtaka

– Tí boðaði vit Reiðarafelagnum frá, at slepti tað ikki kravinum, var ongin møguleiki at koma longri við samráðingunum og at tað tí varð neyðugt at senda boð eftir semingsmanninum.

Ellintur Abrahamsen sigur, at sostatt varð semingsmaðurin boðsendur og hann hevur longt sáttmálan til mánadagin 16. desember á miðnátt og hevur sostatt útsett eitt møguligt verkfall til tá.

Tað, sum Skipara- og Navigatørfelagið vil hava broytt, er at fáa greiði á nøkrum viðurskiftum, eitt nú í teimum førum, har fiskur verður frystur umborð. Somuleiðis er sáttmálin við Norðborg ongantíð fingin í lag og tað vil felagið hava nú. Og so eru tað ymisk viðurskifti við Nótabátunum eisini, sum felagið við hava broytt.

– Hetta er fyri ein part afturvendandi krøv, men summi mál eru so gomul, at tey mugu fáast í rættlag, sigur Ellintur Abrahamsen.

Sí eisini greinina “Kann væl henda at fiskiflotin verður lagdur”.

# Kann væl henda at fiskiflotin verður lagdur

**Skipara- og Navigatørfelagið hevur sett krøv, sum vit undir ongum umstøðum kunnu góðtaka, sigur Jàkup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*

– Tað kann væl henda, at fiskiflotin verður lagdur nú um nýggjársleitið.

So langt heldur, formaðurin í Reiðarafelagnum, at tað er ímillum partarnar, nú samráðingar eru við Skipara- og Navigatørfelagið um nýggjan sáttmála.

Jákup Sólstein vísir á, at bæði Reiðarafelagið og Skipara- og Navigatørfelagið hava sett síni krøv og í løtuni er heilt langt ímillum partarnar.

Sáttmálin gekk út 1. desember, men eftir tveir fundir hava partarnir viðurkent, at teir koma ikki longri og hava tí boðsent semingsstovninum.

Semingsstovnurin hevur longt sáttmálan og harvið eitt møguligt verkfall til mánadagin 16. desember á midnátt.

### Avtala av sáttmálin kundir broytast

Partarnir eru ikki so frægt sum samdir um grundarlagið fyri sáttmálasamráðingunum.

Skipara- og Navigatørfelagið vil samráðast útfrá galdandi sáttmála, soleiðis sum hann varð undirskrivaður í januar 1999.

Men eftir at sáttmálin var undirskrivaður, gjørdi Reiðarafelagið ymsar broytingar í honum. Og Reiðarafelagið vil bara samráðast út frá hesi broyttu útgávuni.

Og tað vil Skipara- og Navigatørfelagið ikki hoyra talan um, tí felagið vil einans halda seg til tað, sumer undirskrivað.

– Tað var avtalan, at tað skuldi bera til at broyta sáttmálan, eftir at hann varð undirskrivaður, sigur Jákup Sólstein.

Hann sigur, at samráðingar vóru við fleiri feløg ísenn, bæði Fiskimannafelagið, Motorpassarafelagið og Maskinmeistarafelagið og sáttmálarnir vórðu í veruleikanum skrivaðir av nýggjum.

– Tí tryggjaðu vit okkum, at tað skuldi bera til at broyta sáttmálan eftir at hann var undirskrivaður, vísti tað seg, at villur vóru komnar í, soleiðis at hann ikki samsvaraði við tað, sum í veruleikanum varð avtalað.

– Tað afturvísir Skipara- og Navigatørfelagið?

– Tað fái eg ikki gjørt nakað við. Men tað var avtalan við øll feløgini og tað hava vit ikki havt trupulleikar av at gera broytingar í sáttmálunum við hini feløgini og bæði sáttmálin við Fiskimannafelagið og Maskinmeistarafelagið eru síðani broyttir tí tað vísti seg, at undirskrivaði teksturin ikki samsvaraði heilt við tað, sum varð avtalað í sjálvum samráðingunum.

Jákup Sólstein sigur, at rættarmálið hevði onki við Reiðarafelagið at gera.

– Tað var ímóti semingsstovninum og tí eru vit ikki partur í máliunum.

Jákup Sólstein sigur, at tað, sum varð skrivað í sáttmálan, var í einstøkum førum ikki tað, sum varð avtalað og tí hava vit broytt sáttmálan so at hann samsvarar við tað, sum varð avtalað í sjálvum samráðingunum

Jákup Sólstein sigur, at Skipara- og Navigatørfelagið hevur biðið Reiðarafelagið boðað limum sínum frá, at arbeiða eftir sáttmálanum, sum varð undirskrivaður, men tað hevur Reiðarafelagið ikki gjørt.

– Vit hava virkað eftir tí, sum varð avtalað í samráðingunum. Tað sigur seg sjálvt, at kemur nakað skeivt fyri, tá ið sáttmálin verður undirskrivaður, so at teksturin ikki samsvarar við tað, sum er avtalað, verður tað rættað og tað hava vit ikki havt trupulleikar av við hinum manningarfeløgunum.

### Umfatandi krøv

Annars sigur Jákup Sólstein at krøvini frá Skipara- og Navigatørfelagnum til nýggja sáttmálan eru rættiliga umfatandi og tey hevur Reiðarafelagið víst frá sær.



*Skipara- og Navigatørfelagið setir krøv, sum vit undir ongum umstøðum kunnu góðtala, sigur Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum*

Hinvegin hevur Reiðarafelagið kravt, at ávísir yvirmannapartar fara niður. Eitt nú hevur felagið kravt, at har skiparin fær meiri enn 2,75 partar, skal parturin lækka niður í 2,75. Talan er eitt nú um skiparar á flakatrolarum, stállínuskipum og aðrastaðni.

Harumframt eru onnur krøv frá Reiðarafelagnum.

Hinvegin hevur Skipara- og Navigatørfelagið kravt at yvirmenn skulu fáa frítíðarløn av allari lønini, sum er fáa teir frítíðarløn av einum parti. Samstundis vilja navigatørarnir hava onkrar yvirmannapartar uppeftir, men tað vil Reiðarafelagið ikki.

Navigatørarnir krevja eisini eftirløn, men har hevur Reiðarafelagið bjóða teimum somu skipan og samu krónutal og dagatal, sum fiskimenn hava.

Les eisini greinina “Verkfallið útsett í 14 dagar”.